## Floksformaður háðaður

Løgreglan mátti leggja uppí, tá formaðurin í týska javnaðarflokkinum, Franz Múntfering, helt røðu í býnum Dússeldorf í sambandi við altjóða arbeiðaradagin sunnudagin.

Tað var ikki av tilvild, at Franz Múntfering hevði valt at halda røðu í Dússeldorf. Býurin er høvuðsstaður í landslutinum Nordhrein-Westfalen, har val verður um tríggjar vikur, og alt bendir á, at samgongan hjá javnaðarflokkinum og Teimum Grønu fer at tapa stórt. At veljararnir hava vent SPD bakið sást týðiliga á fundinum sunnudagin, har misnøgd fólk tveittu egg eftir Franz Múntfering og róptu háðani orð eftir honum. At enda mátti løgreglan leggja uppí fyri at verja floksformannin.

Tað hevur ikki bøtt um støðuna hjá SPD, at fyrrverandi floksformaðurin Oscar Lafontaine hevur funnist hvassliga at sosialpolitikkinum hjá flokkinum og stjórnini. Tað hevur fingið leiðsluna í flokkinum at umhugsa at koyra hann úr flokkinum, skrivar DPA.

## Assad kann fella

Nógv bendir á, at forsetin í Sýrialandi, Bashar Aassad, situr ikki serliga tryggur í embætinum.

Fyri stuttum noyddist Assad at taka teir sýrisku hermeninar úr grannalandinum Libanon. Afturtøkan fer at hava stórar fíggjarligar og sosialar avleiðingar við sær, men tað er ikki tann einasti trupulleikin, sum forsetin hevur at dragast við, sigur ovastin í ísraelsku hernaðarfregnartænastuni, Ahron Zeevi, við blaðið Yedioth Aharonot. Hann vísir á, at Sýrialand og Turkaland eru ósamd um eina týðandi vatnveiting, og harafturat eru jordanar misnøgdir við, at Sýrialand ikki hevur hildið eina avtalu um at lata Jordan eitt landaøki.

Ahron Zeevi sigur, at megnar Bashar Assad ikki at loysa trupulleikarnar, fara sýrialendingar at missa álitið á honum, og so kann hann skjótt fella. Hendir tað, fer svágur forsetans, Maher Assad, helst at taka við, men eitt annað forsetaevni er fregnartænastuovastin Asaf Shaukat, sigur Zeevi.

## Stór borgarlig framgongd

Teir borgarligu flokkarnir í Svøríki hava havt so stóra framgongd í seinastuni, at tann seinasta mánaðin er munurin ímillum teir og stjórnarflokkarnar tvífaldaður, og munurin er nú tann størsti síðani 1991.

Hetta sæst í einari meiningakanning hjá blaðnum Dagens Nyheter. Kanningin vísir, at javnaðarflokkurin er framvegis tann størsti við 32,3 prosentum, men tað er kortini nóg minni enn á valinum fyri trimum árum síðani, tá flokkurin fekk 39,8 prosent. Samstundis hevur tann borgarligi Moderatarna næstan fingið javnaðarflokkin aftur. Moderatarna fær sambært nýggju kanningini 30,1 prosent ella næstan tvær ferðir so nógv sum á valinum í 2002, tá flokkurin fekk 15,7 prosent av atkvøðunum.

Kanningin hjá Dagens Nyheter vísir, at 42,3 prosent av veljarunum høvdu atkvøtt fyri verandi stjórnarsamgongu, var val nú, og at 53,5 prosent høvdu atkvøtt fyri teimum borgarligu andstøðuflokkunum. 23 prosent av teimum spurdu siga seg ikki vita, hvar tey høvdu sett krossin, var ríkisdagsval nú.

## Rættarmálini kunnu byrja

Nú er klárt at fara undir rættarmálini ímóti teimum, sum stóðu á odda fyri tí sera harðrenda stýrinum hjá teimum reyðu khmerunum í Kambodja í sjeytiárunum. Tað kunngjørdi Kofi Annan, ST-aðalskrivari, sunnudagin.

Reyðu khmerarnir ráddu fyri borgum í Kambodja í árunumm frá 1975 til 1979, og teir fóru sera illa við fólkinum. ST-metingar siga, at umleið 1,7 millión fólk ella ein triðingur av kambodiska fólknum doyðu av huingri, sjúkum og í arbeiðslegum, men fleiri túsund teirra vórðu heilt einfalt avrættað. Ágangurin steðgaði ikki, fyrr enn vietnamesiskir hermenn róku stýrið hjá teimum reyðu khmerunum frá í 1979.

Tað hevur gingið striltið at revsa teir khmer-leiðararnar, sum framvegis eru á lívi, men sunnudagin segði Kofi Annan, at nú hevur ST fingið nóg mikið av peningi, til at rættarmálini kunnu byrja. Løgfrøðingar úr Kambodja og altjóða løgfrøðingar skulu taka sær av málunum.

### UTTAN ÚR HEIMI

# Avstralia slakar ikki




*Douglas Wood bað Avstralia, Bretland og USA taka hermenninar úr Irak. Gera tey ikki tað, hava burturflytararnir hótt við at taka hann av døgum*

*Mynd: Reuters*

**Avstralsku mndugleikarnir fara ikki at gera eftir kravinum frá teimum, sum hava burturflutt avstraliumannin Douglas Wood**

GÍSLATØKA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Sunnudagin kunngjørdi ein uppreistrarbólkur í Irak, at hann hevði burturflutt tann 63 ára gamla avstralska ríkisborgaran Douglas Wood. Á einari sjónbandsupptøku bað Douglas myndugleikarnar í Avstralia, Bretlandi og USA taka sínar hermenn úr Irak, tí burturflytararnir høvdu hótt við at taka hann av døgum, bleiv kravið ikki eftirlíkað.

Men avstralski forsætisráðharrin, John Howard, gjørdi longu sunnukvøldið greitt, at stjórnin fer ikki at gera eftir kravinum.

- Vit fara at gera alt, sum stendur í okkara makt, fyri at fáa burturflytararnar at lata Douglas Wood leysan, men vit fara ikki at víkja frá tí veruleika, at Avstralia slakar ikki fyri gíslarænarum. Vit fara heldur ikki at lata yvirgangsmenn stýra okkara uttanríkispolitikki, segði Howard í einari útvarpsrøðu sunnukvøldið. Hann legði afturat, at herurin hevur skipað eina serliga deild, sum skal royna at fáa gíslan leysan.

Tann 63 ára gamli Douglas Wood er avstralskur ríkisborgari, men býr í Kalifornia í USA, haðani kona hansara eisini er ættað.

# Børn missa endurgjald fyri gíslatøku

**Myndugleikarnir í Russlandi hava gjørt av, at 30 gíslar, sum sluppu til rýmingar úr skúlanum í Beslan, skulu missa endurgjaldið**

ENDURGJALD
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

30 skúlabørn, sum vóru so heppin at sleppa til rýmingar úr skúlanum í russiska býnum Beslan, tá yvirgangsmenn tóku skúlan tann 1. september í fjør, noyðast nú í rættin.

Nakað eftir at gíslatøkan var av, samtyktu russisku myndugleikarnir, at tey børnini, sum sluppu frá atsóknini á lívi, skuldu fáa slakar 10.000 krónur í part sum endurgjald frá tí alnmenna. Tey 30 børnini, sum sluppu til rýmingar, fingu eisini endurgjald, men nú hava myndugleikarnir boðað frá, at teir skulu hava pengarnar aftur frá teimum 30 børnunum.

- Teir næmingarnr, sum vóru so hepnir at sleppa úr skúlanum, fingu ongan skaða og vóru ongantíð gíslar. Tí eiga teir at rinda pengarnar aftur, sigur ein talsmaður hjá myndugleikunum við blaðið Gazeta.

- Tað má sigast at vera smáligt av myndugleikunum at taka eina slíka avgerð, og tað er ófatiligt, at teir ætla at draga børnini ígjøgnum eitt rættarmál, sigur Lida Komajeva, varablaðstjóri á einum blaði í Beslan. Hon sigur, at málið verður nú sent russiska mannarættindaumboðsmanninum.

Lida Komajeva sigur við Aftenposten, at tey flestu børnini í Beslan eru farin aftur í skúla, men nøkur orka ikki, og vey liggja framvegis á sjúkrahúsi, sigur hon.